veður í dag, eitt lítið lot av suðri. Eg havi nú aftur bakað. Eg fekst við at svølla eitt sindur herfyri, nú eri eg sum sagt frískur. Eitt skip hava vit sæð, tað er danska "Fylla". Í dag havi eg verið í lastini (og rivið um). Alt væl.

**Týsdagur, 29. apríl**
Veðrið er gott. Ættin útnyrðingur. Vit hava o.u. 1200 fiskar. Eitt skip hava vit sæð. Eg havi arbeitt í lastini eina løtu. Alt væl.

**Mikudagur, 30. apríl 1930**
Veðrið má kallast at hava verið gott í dag, tó at tað hevur verið dimmligt og nógv regn. Tað var eitt lot av landsynningi, men regnaði seg vestur um, so nú er hann vestan. Vit hava o.u. 800 fiskar. Vit sóu "Sigrid". Alt væl.

**Hósdagur, 1. mai**
Gott veður. Hava o.u. 2000 fiskar. Ættin er landsynningur. Nú er saltið næstan uppi. Tað fer nokk alt á (fiskin) í kvøld. Vit hava sæð "Sigrid" og eina 3 mastraða skonnart, halda tað vera "Ondina". Alt væl.

**Fríggjadagur, 2. mai**
Vóru á veg inn á Reykjavík, men lógu ikki upp og vendu so aftur. Ættin er landsynningur. Vit vóru so eystarlaga, at vit lógu ikki Skagen upp. Komu aftur á fiskileið kl. 3 seinnapartin og fingu o.u. 400 fiskar. Tað er sjaskveður og øgiligt regn. Alt væl.

## Saltið uppi

**Leygardagur, 3. mai**
Gott veður. Tað bleiv innhálað kl. 4 seinnapartin, tá fingu vit ikki saltað meir. Preiaðu "Ondina", skiparin var umborð, hann hevði 60.000 (fiskar), og kundi einki salt lata. "Titania" preiaði okkum, hon hevði 92.000. Vit royndu eisini "Yvonnu", hon hevði 65.000, heldur einki salt haðani. Vit sigla nú inn á Reykjavík, tað er eitt fitt lot av suðri. Alt væl.

**Sunnudagur, 4. mai**
Veðrið er gott. Tað var eitt lot inntil kl. 6. Lógu nakað í stilli út fyri Akranesi. Vit komu tó inn o.u. kl. 6. seinnapartin. Ankraðu fyrst á reduni, men lógu í vegin fyri ferðsluni, blivu so togaðir inn í havnina. "Silver Spray" lá inni, tá vit komu og Janus var eina løtu umborð hjá okkum. Teir fóru skjótt út eftir, at vit vóru innkomnir. Vit vóru so í landi á Sjómansstovuni og til møti. Alt væl.

**Mánadagur, 5. mai**
Tóku 3½ tons av salti. Fóru so út alt fyri eitt. Blivu togaðir út um klokkuboyuna. Lógu aftur í stilli út fyri Akranes. Har skutu teir lomvigar, og fingu 2 fuglar í part. Alt væl.

**Týsdagur, 6. mai**
Gott veður, eitt lítið fleyr av útnyrðingi. Sóu fýra skip fara heim. Komu á fiskileið kl. 6 í kvøld. Nú verður tað nokk ikki leingi inntil vit fara heim. Tað saltið, sum vit tóku, verður ikki leingi at fiska upp, um nakar fiskur verður. Tað verður spennandi at koma heimaftur, nú stendur nógv í vága. Hvussu man tað fara at ganga hugsi eg ofta. Á tú, Anna, hvat man tú hugsa, man tú fara at skoyta um meg, eg elski teg, tú, eg elski teg, annað veit eg ikki at siga. Tað sær myrkt út fyri mær, um tað ikki eydnast. Harrin vælsigni teg!

**Mikudagur, 7. mai**
Gott veður. Stilli og slætt í sjónum. Fingu 1500 fiskar, tá sigldu vit eisini nakað. Skipini eru meiri ótøtt nú at síggja. Vit hava nokk sæð eini seks sluppir. Skonnartirnar eru horvnar higani, síðan vit fóru inn á Reykjavík. Tær eru nokk farnar upp undir Jøkilin. Veðrið hevur verið gott í dag, men disut loft, sólin hevur ikki sæð. Summir eru komnir uppí 200 á snørið (Jákup Pauli). Fiskurin man fara at rýma nú, tí hann er fullur av gróti, tað plagar at vera merkið. Nú hava vit fingið 30.000, so nú fara vit heim, tá vindur verður. Kokkaríið hevur gingið væl. Lomvigi til døgurða. Ættin er landnyrðingur. Alt væl.

**Hósdagur, 8. mai**
Gott veður, eitt lítið fleyr av útnyrðingi. Vit hava o.u. 1200 fiskar. Nú liggja teir og tota eftir at fáa 31½ túsund. Fólkið er farið at telja (dagarnar). Skipini rýma so við og við. Hetta er vist seinasta royndin hjá okkum. Tað verður sett á segl, tá inn verður drigið, og heim. Ja, vit leingjast, tá tann tíðin kemur. Ein og annar sigur vist nokk, at hann leingist ikki, men tað er ikki satt, tað sæst á øllum, at teir leingjast. Ja, Jesus verið so við okkum hesa reisuna, og føri okkum í øllum góðum. Hann rekur av landsynningi. Tað er disut luft. Høvdu vit fingið eina góða reisu og góðan vind. Nú setur skiparin út í kortið. Alt væl.

**Komandi partur**
Næstu ferð frættist hvussu tað gekk við fríggjarabrævinum Bernhard sendi Onnu, beint áðrenn teir fóru avstað



Ernestine er ímyndin av einum tí fremsta bjargingarbragdi í føroyskari fiskimannasøgu



*Eitt av skipunum, sum teir á Suðuroy sóu undir Íslandi, var Ondine TN 332. Tann svarthvíta sluppin inni við kajuni er Buttercup, sum Andreas í Túni á Toftum førdi í nógv ár*



*Í 1934 var Bernhard við Nólsoy*

Sosialurin